Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

# Leiðandi økonoma

Starvið sum leiðandi økonoma á Lágargarði er leyst at søkja til setan frá 1. mai 2005.

**Førleikakrøv:**
Leiðandi økonoman skal hava prógv sum økonoma og skal hava leiðsluroyndir, góð samstarvsevnir og hava hug til menning og nýhugsan.

Køkurin á Lágargarði ger dagliga døgverðar til uml. 150 heimabúgvandi pensionistar umframt til búfólk, dagstovnafólk og starvsfólk á stovninum. Hartil fáa aðrir stovnar eisini døgverða frá køkinum á Lágargarði í alt meira enn 200 døgverðar dagliga, og ætlandi skal virksemið økjast enn meira.

Starvið er fulltíðarstarv og lønt samb. sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Økonomafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 316788.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og møgulig viðmæli skulu sendast til

**Leiðaran á Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreist 14.03.05.

# Stórkappingar í rútmiskum fimleiki

**í høllini á Hálsi leygardagin og sunnudagin kl. 15.00**

Kostnaður fyri vaksin 80,00 og børn 10,00.

Eisini verða tiltøk í gongini: Høvi verður at **tippa** hvør verður nr. 1, 2, 3, 4, og 5, **tombola** og **søla av lyklum** til skutara.

Møtið fjølment.

**Føroya Fimleikasamband**

HJÁ GUNLEIVI

## Krambafólk

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir fyrikomandi og røskum krambafólki til skiftandi vaktir, uml. 30 tímar/viku.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Ann-Britt.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 51 60 ella 31 21 61

# Landmálings- ella matrikulteknikari

Søkt verður eftir hjálparfólki at arbeiða í matrikulsins umsiting og útskiftingini frá 1. apríl 2005.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:
- Prógv sum landmálingsteknikari, matrikulteknikari ella líknandi.
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Bjarna Hansen, leiðara av matrikulsins umsiting.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
Postboks 327
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 14. mars 2005.

*Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar, kortlegging og adressurskráir. Á stovninum starvast 17 fólk.*

# Vaskifólk

**Til gomlu læknahúsini hjá Runavíkar kommunu**

Søkt verður eftir vaskifólki til Frítíðarskúlan/Dagrøktina í Runavíkar Kommunu, at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu. Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Starvssetan sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast á tlf. 448594 lok. 10.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast mánadagin 07.03.05 og senast til:

Runavíkar Kommuna

**Barnalonina**
Heiðavegur 22,
600 Saltangará

**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fyrstalærarastarv í Eiðis skúla

Starvið sum fyrstilærari í Eiðis skúla verður lýst til setanar frá 1. apríl 2005.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av starvinum á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 2. mars 2005. Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 14. februar 2005

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 - Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

# Álítandi fólk

Vit søkja eftir álítandi fólki at arbeiða fulla tíð í náttúrudeild okkara beinanvegin.

Í Náttúrudeildini selja vit m.a. hegn, stik, fiskireiðskap, urtagarðsamboð.

Arbeiðið umfatar alt vanligt krambúðararbeiði. Vit vænta, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og at tú ert royndur innan krambúðaryrki.

Umsóknir verða at senda til:

**Thomas Dam á Hálsi**
Postboks 2148 · 110 Tórshavn
ella: th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi

Eru spurningar, ring til Bjørg, tlf. 266777

# Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag

# Aðalfundur

verður í húsinum hjá Vágs Matmøðrafelag mánadagin 7. mars kl. 20.30 og ikki mánadagin 28. februar sum áður lýst.

**Til salg:**
**Toyota Previa Benzin 2,4 GL VAN/MULTI**



5 gear, 132 HK, grønmetal.
1. reg.: 12/09-95.
El-ruder, tonede rude bagi, SONY CD-afspiller, stænkklapper, vindafvisere, startspærre. Købt og kørt i Danmark. Kom til Færøerne og synet Marts 2004.
PAVA Undervognsbehandlet foråret 2004. Ikke ryger. God komfort og driftsikker bil/varevogn. Kørt 210.000 km, fået 200.000 km eftersyn Jan05.

**Til salg for 85.000 kr.** **Mobil: 27 18 27**